Kyndil-KÍF 22-22 (13-13)

# KÍF gav Kyndli eitt stig

**KÍF hevði í longum løtum tamarhald á tí, sum fyrifórst á vøllinum, men seinastu løtuna varð leiðslan tveitt burtur, og kyndilsmenn eiga at vera meira enn fegnir um, at teir hóast alt fingu eitt stig burtur úr dystinum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Vónbrotið var stórt hjá báðum pørtum, tá dysturin millum Kyndil og KÍF varð blástur av mikukvøldið.

Aloftast er jú annars soleiðis, at í øllum førum annar parturin er fegin um úrslitið, men hesa ferð hevði hvørgin teirra orsøk at fagna javnleikinum. Tað var, sum um báðir partar vistu, at her var einki stig vunnið. Hinvegin høvdu teir tapt eitt hvør. Kyndil, tí teir undan dystinum vóru at meta sum greiðir favorittar, meðan kollfirðingar mundu iðra seg um, at tað ikki eydnaðist teimum at binda posabandið fyri, tá stigini so at siga vóru heima.

## Skert kyndilslið

Tað var annars eitt kyndilslið í eini heldur skerdari útgávu, sum fór á vøllin, tá dysturin byrjaði. Umframt Rúna Poulsen, sum framvegis er úti við skaða, hevði Hans Áki Dal-Christiansen leikbann, og fram til dystarbyrjan var ivamál um fleiri aðrar leikarar.

Um tað var hetta, sum órógvaði, ella um tað vóru aðrar orsøkir, skal sleppa at standa ósvarað, men undir øllum umstøðum tóktist kyndilsleikararnir at hava óvanliga torført við at fáa glið á spælið. Ferð var at kalla eingin, og tí var tað lutfalsliga lætt hjá kollfirðingunum at verja fyri.

Verjuparturin var tó ikki nakað, sum riggaði serliga væl hjá liðunum báðum hendan dagin. 22 mál til hvørt liðið ljóðar kanska ikki av so nógvum, men størsta orsøkin til hetta skal finnas tí avrikunum hjá málverjunum báðum, ella var talan eisini um vánaligar avslutningar.

Ikki minst kom hetta KÍF til góðar, tá Kyndil fyri einastu ferð í dystinum hótti við at rýma frá gestunum. Kyndil hevði tá eina tvey mála stóra leiðslu, men hóast fleiri góðar møguleikar at økja, so eydnaðist Óla Christian Djurhuus í málinum hvørja ferð at verja fyri.

Ístaðin vann KÍF seg spakuliga upp á og fram um Kyndil, og tað skuldi vísa seg, at Kyndil ongantíð vann leiðsluna aftur eftir hetta.

## Tveittu alt burtur

Í seinna hálvleiki vóru tað kollfirðingar, sum høvdu betra takið. Teir løgdu bragdliga fyri, og tað eydnaðist teimum eisini at skapa eitt hol á tvey mál til Kyndil. Hevði Jens ikki tikið sær av so nógvum, hevði sovandi kyndilsverjan væl kunna viðført, at gloppið gjørdist størri. Holini í verjuni vóru gapandi í fleiri førum, og at kollfirðingar vóru teir grammaru sást eisini aftur, tá Jens tað einu ferðina framdi dupultbjarging móti fríspældum kollfirðingum, fyri síðani at síggja seinasta bóltin fara hoppandi í málið.

Tað var sum um munurin bert stóð við, og tá Kyndil heldur ikki megnðai at gera sær dæl av yvirtalsstøðum, mundi vónin fara hjá teimum flestu av fáu kyndilsáskoðarum.

Við sjey minuttuim eftir vann KÍF seg aftur trý mál fram um, men so steðgaði eisini upp hjá teimum. Kyndil skeyt seg upp á javnt næstu tveir minuttirnar, og so var alt opið aftur.

Seinastu løtuna var tað tó sum um, at liðini bæði fóru at kappast um nakað heilt annað. At síggja til ráddi um at tveita flest møguligar bóltar burtur, og hetta megnaðu báðir partar eisini sera væl. Megnaði teir so kortini at spæla seg ígjøgnum, stóðu málverjarnir fyri, og fjálturin á leikarunum gjørdist alsamt størri. Hjá Kyndli tí teir nú høvdu møguleikan at vinna, meðan KÍF nú sá, at alt stríðið møguliga var til onga nyttu.

Seinasta minuttin bar av. Fyrst tveitti venjarin hjá KÍF ein heldur óneyðugan bólt burtur, tá hann royndi seg við smartari fríspæling. Kyndil fór í mótálop, men her eydnaðist teimum at klodda so við bóltinum, at hann kom í beinini á Una Wardum. Við 30 sekundum eftir, høvdu kollfirðingar nú møguleikan at avgera, men ístaðin fyri at spæla tíðina út, royndu teir seg við skotið tá 15 sekund vóru eftir, og so kundi Kyndil fara í álop.

Í royndini at avgera dystin, sendi Bjarni tá eina skeiva sending, sum endaði beint í fanginum hjá Eddie Joensen. Úr verjuni skeyt hann beinleiðis móti málinum, og tað var greitt, at skotið snýtti Jens Skipagøta. Hann hevði ongan livandi møguleika at koma aftur at verja fyri men lukkutíð rakti bólturin á stongina. Vandin var tó ikki av, tí í seinasta sekundinum hevði ein leysur Jákup Dam møguleika at avgera, men Jens fekk tó bjargað øðrum stiginum.



*Kyndil hevði als ikki tamarhald á verjupartinum, har kollfirðingar ferð eftir ferð sluppu at hóreiggja sær, sum teimum lysti*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Brekið má finnast

Eitt stig, sum hvørgin parturin kann vera nøgdur um. Kyndil man hava avskrivað fremsta plássið, men verður avrikið ikki betra komandi dystirnar, er vandi fyri, at teir eisini mugu avskriva silvurmerkini.

Fyri kollfirðingar var vónbrotið stórt, men hetta sýnir eisini, hví teir so ofta bert hava verið nær við, uttan kortini at koppa teimum stóru. Fram til teir seinastu og avgerandi minuttirnar varð ofta spælt við skili, men seinastu løtuna datt alt hetta niðrufyri. Uppgávan hjá venjaranum verður tí helst, at finna út av, hví so er, og so annars at bøta um hetta til næstu ferð møguleikin býðst. Tað fer hann heilt víst at gera, og so ræður bara um at taka av.

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
Kyndil: Uni Wardum 8(3), Jónleif Sólsker 7, Bjarni Wardum 4, Regin M. Petersen 1, Janus E. Sørensen 1, Høgni Klein 1
KÍF: Jákup Dam 6, Durica Tomic 5, Iljan Topic 3, Petur Martin Johansen 3(2), Regin Petersen 1, Petur Martin Poulsen 1
Brotskøst: Kyndil 5, KÍF 3
Útvísingar: Kyndil 4, KÍF 5
Diskvalifikatión: KÍF 1 (beinleiðis reytt til beinkin)
Dómarar úr Neistanum: Hjalmar Petersen og Kristian Johansen. Høvudu viðhvørt hug at sovna saman við spælarunum.

# Uttanfyri



Fyri bæði Hans Áka Dal-Christiansen og Rúna Poulsen mundi tað kendast hugstoytandi at sita á áskoðaraplássunum og hyggja at, meðan liðfelagarnir tókust við KÍF.

Hvørgin teirra kundi tó gera nakað fyri hjálpar liðfeløgunum, men um ikki annað kunnu teir síggja fram til, at teir innan leingi aftur fáa spælt á liðnum.

Hans Áki hevði leikbann hesaferð, og er sostatt tøkur aftur til komandi dyst, meðan Rúni í eina tíð hevur drigist við skaða. Ótti var fyri, at talan við krossbandsskaða, men nú er líkt til, at útlitini hóast alt ikki eru so døpur, og Rúni verður innan stutta tíð aftur til reiðar at tørna út fyri teir grønu.



VIÐMERKINGAR

# Góðtaka ikki at verða settir í síðstu røð

**Jonhard West**
*Tvøroyri*

Suðuroy og restin av útjaðaranum eru heilt gloymd av landstýrinum í hesum fullveldistíðum. Tað verður bert hugsað um fullveldið og hvussu Føroya fólk skal lumpast til at atkvøða ja á atkvøðuni í mai.

Útjaðarin, ið eisini skuldi fáa ágóðan av oljuvinnini, er heilt gloymdur, og alt virksemi í sambandi við oljuvinnuna verður lagt í miðstaðarøkið. Øll lyftini um at okur eisini skuldu fáa nakað av virkseminum, vístu seg at vera nøkur tóm lyfti, ið okur vóru býtt nokk at trúgva uppá. Okur áttu at vitað, at tað fór at verða sum so vanligt, og at okur einki fóru at fáa. Meðan meir og meir verður lagt í miðstaðarøkið, verður enn lovað okkum ein part av virkseminum. Eg kundi hugsað mær at fingið at vita, hvat nú er eftir at leggja í Suðuroy og sum skapar nøkur arbeiðspláss, tí sum nú er hava tey, ið fara av oynni fyri at fáa sær eina útbúgving, ongan møguleika at flyta aftur í oynna eftir lokna útbúgving. Tað er á hesum øki, at okkurt má verða gjørt, um fólk framhaldandi skal hava møguleika at búgva í oynni.

Um úrtslitið av fólkaatkvøðuni í mai,verður eitt ja, so verður eingin sum helst møguleiki at verða búgvandi í Suðuroy, tí so fáa vit eingi nýggj arbeiðspláss suður, og fleiri av teimum fyritøkum, ið eru her suðuri, fara á húsagang. Í einum føroyskum fullveldi verður oyggin avtoftað, tí einasta staðið, ið kemur at klára seg ”hampuliga”, verður miðstaðarøkið.

Tí fari eg nú at taka undir við Finnleifi Guttesen um at tað hevði verið uppá sítt pláss, at tað á atkvøðuseðlunum í Suðuroy var ein annar møguleiki at velja, og hann skuldi verið, at um føroyingar atkvøða ja fyri fullveldisætlanini hjá landsstýrinum, so skulu suðringar kunna velja, um okur frammhaldandi vilja verða ein partur av Føroyum, ella um okur vilja loysa frá restini av Føroyum.

Um úrslitið av fólkaatkvøðuni verður eitt nei, so muga allir Suðringar standa saman fyri at menna oynna og vísa, at okur ikki góðtaka at verða settir í síðstu røð.

# Ynskidreymar?

**Steinbjørn B. Jacobsen**



Hóast tú sanniliga hevði ynskt, at kunna tosað um Suðuroynna sum eina eind, kann tú ikki gera tað enn.

Her er nógv eftir, sum bert suðuroyingar sjálvir mugu gera, fyri at so skal vera.

Nú oljuhavnin ikki var løgd á Tvøroyri eru góðar grundir og stundir til at hgusa seg um og íta av nýggjum.

Óivað var tað skilagott, at Tvøroyri var við í oljuhavnakappingini, men tíverri rakk hon ikki á mál. Skilagóðar greinar hava longu verið at sæð (Jákup Joensen, Jacob Vestergaard, Dánjal Bjarkhamar og viðtal hevur verið við Hendrik Thomsen og Viberg Sørensen) men hinar hava verið lítið uppbyggjandi. Sjálvandi skilur tú at menn eru vónsviknir, men tílíkar kenslur plagdu ikki at bera ávøkstur.

Fleiri hava borið fram, at nú beyð Suðuroyggin ikki bøtur, øll sum hon er, fór hon fyri bakka og sjálvur nývaldi borgmeistarin á Tvøroyri fær seg til at tosa um einar sjálvstøðugar Suðuroy. Kom at minnast til, at í 1946 hoyrdist eisini tílíkt tos, men tá skuldi Suðuroyggin vera eitt danskt amt, meðan restin av Føroyum var republik. Eisini tá var tað Tvøroyri, sum tosaði vegna Suðuroynna.

Um Tvøroyri hevði verið stórt og sterkt, kundi tað gagna allari oynni, men tíverri er hon alt annað enn tað. Hon er tann kommunan í landinum, sum so løgið tað ljóðar, skildar mest.

Sjálvandi er tað skilaleyst at siga, at Suðuroyggin doyr út um ein oljuhavn ikki kemur.

Hetta verður sagt um somu tíð, sum tey gleðiligu tíðindini berast, at eitt stórt virki til 20 mans verður bygt í Vági.

Tað er lívsneyðugt, at orkan verður brúkt rætt og at kjakið er kveikjandi.

Mundu allar súðir verið siftar, um ein oljuhavn varð løgd á Tvøroyri?

Hugsi ikki at nakar er førur fyri at svara hesum, men vit vildu so fegin trúð, at so var.

Spurningurin, sum nógv seta sær við tí vitan ein fær frá fjølmiðlunum, er um málið frá byrjan til endan var rætt handfarið?

Oljhavnin skuldi vera har samferðsluhavnin til alla Suðuroynna var á Drelnesi, sum Tvøroyri hevur tvíhildið um, skuldi vera samferðsluhavn hjá oynni.

Eisini mást tú spyrja, um tað felagið sum Tvøroyri valdi at samstarva við hevur gingið heilhjarta inn fyri at fáa oljuhavnina lagda har. Tað er nú einaferð ikki nóg mikið bara at vísa á, at ein er stórur og hevur havt oljuhavn í Esbjerg.

Best hevði verið, um Tvøroyri var gingið saman við restini av oynni og samst um, hvar ein ídnaðarhavn og ein samferðsluhavn skuldi ligið.

Vit kunnu skjótt semjast um, at samferðslan til oynna er ein høvuðsspurningur, men verri er kanska at finna bestu loysnina.

Alla mína tíð hevur verið tvíhildið um eina loysn, Smirlaloysnin. Skipið skuldi ganga skjótt og vera so stórt, at tað rúmaði teimum mongu bilunum og fólkunum um vikuskiftið. Bara at nevna aðrar loysnir, var sum at vísa hundi brand.

At politikkur, partapolitikkur, er vavdur inn í øll mál, serliga á Tvøroyri, hevur verið lemjandi í ára tíggjur. Alt verður gjørt upp í stemmur. Hvat fólk velja fjórða hvørt ár, mugu tey um.

Tað var sera hugstoytt at uppliva, at spurningurin um oljuhavnina endaði í partapolitikkinum.

Nógv eru dømini um, at tá eitt land ella øki er í stórum trupulleikum, verður leitað eftir eini veldigari loysn ella fólki (Messiasloysnin), sum kundi loysa allar trupulleikarnar í einum.

Tílík hugsan hevur ofta verið vandamikil, mergsúgvandi og forandi fyri at lívførir spírar vóru tæðaðir, sum komnir fyri seg kundu gjørt stóran mun. Sjálvandi er tað freistandi hjá Tvøroyra kommunu, nú at geva oljuhavnini alla skuldina fyri ta vánaligu støðuna, men tað loysir ikki hennara trupulleikar. Grípast má eisini í egnan barm.

# Havnin & útjaðarin

**Jákup Sverri Kass,**
*sjálvstýrismaður*



Hví endar alt í Havn? Grundgevingin er, at tað er nemmast, tí at alt liggur í Havn í forvegin. Og tískil er nemmast at byggja víðari uppá tað, sum longu er.

Politikarar í meginøkinum hava ígjøgnum árini megnað at staðið saman um at fáa almennar íløgur gjørdar her, og úrslitini eru eisini har eftir.

Tað sýnist, sum útjaðarapolitikarar á Føroya Løgtingi hava trupulleikar við at halda saman um at vinna økjum sínum íløgur og framburð. Tað er hendan ósemja teirra millum, sum fyrikemur ætlanum teirra um at fáa undirtøku fyri teirra sjónarmiðum.

Lat meg alt fyri eitt sláa fast, at hóast eg eri valdur her í Suðurstreymi, so meini eg, at vit eisini skulu hyggja útum bøgarðarnar her í Havnini. Og harvið arbeiða sum landspolitikarar. Tskil skortar viljin ikki til at hjálpa at menna og byggja upp útjaðaran. Men hetta hevði verið nógv lættari, um tað eydnaðist útjaðarapolitikarum at standa saman og grundgeva fyri sjónarmiðum teirra.

Tað má vera uppgávan hjá útjaðarapolitikarum at venda sær til okkum í meginøkinum, vit teirra ætlanum um, hvussu teir meina, vit kunnu vera við at menna tann partin av landinum. Líka so nógv sum tað er okkara uppgáva at vísa á, hvat vit meina skal gerast í okkara øki. Tann bíliga grundgevingin um, at vit, politikarar í meginøkinum, bert arbeiða fyri okkara øki, virkar meira sum eitt neyðaróp frá teirra síðu, tí at teir ikki megna at standa saman og fáa nakað av skafti. Gevið okkum í meginøkinum nakað veruligt at halda okkum til. Soleiðis at vit hava eina heildarætlan at taka støðu til!

Hetta skal ikki virka sum krokodillutár frá undirritaða. Eg taki undir við, at vit framyvir menna útjaðaraøkini við almennum íløgum. Men viðvíkjandi vinnuligum útbyggingum, meti eg ikki, at tað almenna eigur at blanda seg uppí. Tað hava vit longu brent okkum av fleiri ferðir. Vinnan má og skal byggjast uppá vinnulig endamál.

Men tá ið tosað verður um almennar íløgur, so gevur hetta høvi til at fáa gjørt nakað við almenna virksemi runt um í landinum. Talan kann verða um út- og umbyggingar innan skúlaverkið, fjarskiftisverkið ella annað.

Vit eiga at gera okkum eina heildarætlan, sum fevnir um alt landið. Eg eri vísur í, at eisini útjaðarin ikki hevði skortað við vælvild, um hann eisini bleiv tikin uppá ráð.

Eitt Føroyar uttan útjaðaran er eitt fátækt Føroyar. Skal okkum øllum framyvir verða lív lagað, so er neyðugt at vit spreiða alment virksemi út um í landinum. Og tí hugsunarháttinum taki eg fult undir við.

So lat okkum standa saman og lóggeva rættvíst, soleiðis at øll økir í landinum fáa sín part av teimum íløgum, sum eisini útjaðarin er ein partur av.